## Til fíggjarnevnd løgtingsins

## Viðmerkingar frá Føroya Fiskimannafelag til uppskot

**LM-037/2023:** Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Skattaumskipan 2024 og 2025, stigvís minking av fiskimannafrádráttinum og avtøka av samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)

**Mótmæla**

Føroya Fiskimannafelag mótmælir uppá tað harðasta, at løgtingið niðurlaðar fiskimannafrádráttin. Hetta er beint ímóti tí, sum allir flokkar lovaðu undan løgtingsvalinum 2022. Allir flokkar lovaðu **ikki** at nerta fiskimannafrádráttin. Vónand halda tit orð.

**Skal heldur økjast**

Í fyrsta lagi mótmælir felagið, at løgtingið ger ein niðurskurð í fiskimannafrádráttinum, og í øðrum lagi heldur felagið, at fiskimannafrádráttin eigur at økjast, eins og norska stórtingið ætlar við samsvarandi skipanini har.

**Høvuðsstaðurin gongur fríur**

Fiskimannafelagið loyvir sær at vísa á, at ætlaða lækkingin av fiskimannafrádráttinum í mestan mun fer at raka borgarar **uttan fyri** høvusstaðin. Sostatt er ætlaða átakið hjá løgtinginum í høvuðsheitum beinleiðis málrætta eftir sjófólki í Klaksvík, Gøtu, Tvøroyri, Runavík, Leirvík, Toftum, Eiði, Fuglafirði, Vágum og Vestmanna.

**Sjófólk eru ikki umfataði av starvslógini**

Sjófólk hava ótrygg viðurskiftir í mun til fastlønt almenn starvsfólk, tá ið sjúka rakar. Alment lønt (les fastlønt) hava starvslógina at líta á, tá ið sjúka ella hóttafall rakar. Víst verður til **løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um starvsmenn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 2. juni 1970.**

Føroya Fiskimannafelag vil vísa á, at **fiskimannafrádrátturin er ein kompensatión** fyri
- at vera so nógv burtur frá heimi og familju og
- fyri - sum víst verður á omanfyri – ikki at vera umfatað av teirri lukrativu starvslógini

**Finn peningin við flytingum á fíggjalógini**

Tað átti at verið munandi lættari at funnið tær 11 mill. við flytingum á fíggjarlógini, heldur enn at áleggja sjófólki t.d. í Gøtu, á Tvøroyri, í Klaksvík, í Runavík at gjalda upphædd-ina.

Tað er bara eitt stað Føroya Fiskimannafelag kann fara eftir mista peninginum, til teir sum eiga skipini.

**Vit mótmæla harðliga hesi atsóknini á føroyska sjófólkið.**

Føroya Fiskimannafelag
Jan Højgaard, formaður